ISBN 99918-60-07-X

# Fólk og vinna í Sandoyar Sýslu í 2006

Dennis Holm og Bogi Mortensen

*Granskingardepilin fyri Økismenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 13/2007**

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, tvs. Kanningararbeiði, sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

**Økislýsing 2006 / 2007**

Arbeiðsritið er partur av verkætlanini Økislýsing 2006 / 2007, sum Granskingardepilin fyri Økismenning fór undir í mai mánað 2006. Hetta er triðja útgávan í smb. við verkætlanina Økislýsing 2006 / 2007. Higartil eru givnar út hesar útgávur:

Arbeiðsrit 11/2006: Arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini, Dennis Holm og Bogi Mortensen

Arbeiðsrit 10/2006: Hækkandi oljuprísir, djúpvatnstrolarar og møguliga avleiðingar fyri Suðuroynna, Bogi Mortensen og Dennis Holm

## Innihaldsyvirlit

1. Inngangur ... 8
2. Háttalag og avmarkingar ... 10
  2.1. Býtið í vinnubólkar ... 11
  2.2. Aðrar avmarkingar ... 12
3. Fólkatalið í Sandoyar Sýslu ... 13
  3.1. Gongdin árini 1990-2007 ... 13
    3.1.1. Til- og fráflyting ... 14
    3.1.2. Lágt burðaravlop ... 16
  3.2. Ávirkan á aldurs- og kynssamansetingina ... 17
    3.2.1. Broytt aldursbýti ... 17
    3.2.2. Kynsbýtið ... 19
    3.2.3. Minking í yngru aldursbólkunum ... 21
    3.2.4. Stór minking í talinum av kvinnum í burðarførum aldri ... 22
    3.2.5. Lutfalsliga lágur føðitíttleiki ... 23
  3.3. Nógv ár við skeivari gongd ... 23
4. Tal av parta- og smápartafeløgum í Sandoyar Sýslu ... 24
  4.1. Talið av parta- og smápartafeløgum vaksið seinastu árini ... 24
  4.2. Lutfalsliga fá feløg stovnað í Sandoyar Sýslu ... 27
5. Roknskapartøl fyri Sandoy ... 28
  5.1. Bruttovinningur ... 28
  5.2. Úrslit áðrenn rentur ... 29
  5.3. Úrslit áðrenn skatt ... 30
    5.3.1. Úrslit eftir skatt ... 31
  5.4. Skuld og eginogn ... 31
  5.5. Lyklatøl fyri Sandoyar Sýslu ... 34
    5.5.1. Lyklatøl fyri vinnuna í Sandoyar Sýslu ... 35
  5.6. Vinnulig niðurgongd seinastu árini ... 39
6. Vakstrarmøguleikar og Sandoyar Sýsla ... 41
  6.1. Undirsjóvartunnil og ávirkan á Sandoynna ... 43
7. At enda ... 46
Bókmentur og keldur ... 48

## Myndir og talvur

Mynd 1. Fólkatalið í Føroyum í Sandoyar Sýslu 1990–2007. 1990=Index 100, tølini eru við ársbyrjan. . 14
Mynd 3. Aldursbýtið í Sandoyar Sýslu 1990 og 2006. Býtt í 10 ára aldursbólkar. .................................. 17
Mynd 4. Aldursbýtið í Sandoyar Sýslu og í Føroyum, pr. 1. jan. 2006. Býtt í 10 ára aldursbólkar. .......... 18
Mynd 5. Aldurs- og kynsbýtið í Sandoyar Sýslu pr. 1. jan. 2006. Býtt í 10 ára aldursbólkar. .................. 20
Mynd 6. Broyting í aldursbólkunum 0-19 ár, í Føroyum og í Sandoyar Sýslu, árini 1990-2006. ............. 21

Talva 1. Føðitíttleikin pr. 1.000 íbúgvar í Sandoyar Sýslu og í Føroyum útvald ár .................................. 23
Talva 2. Tal av Parta- og smápartafeløgum í Sandoynni 31.12 2006 ........................................................ 25
Talva 3. Bruttovinningurin hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005. ....................................... 28
Talva 4. Úrslit áðrenn rentur hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005. .................................... 29
Talva 5. Úrslit áðrenn skatt hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005. ...................................... 30
Talva 6. Úrslit eftir skatt hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005. .......................................... 31
Talva 7. Skuldin hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005. ....................................................... 31
Talva 8. Eginogn hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005. ...................................................... 33
Talva 9. Lyklatøl fyri vinnuna í Sandoyar Sýslu tilsamans. ...................................................................... 36
Talva 10. Lyklatøl fyri fiskivinnuna í Sandoyar Sýslu. ............................................................................. 36
Talva 11. Lyklatøl fyri handilsvinnuna í Sandoyar Sýslu. ......................................................................... 38
Talva 12. Lyklatøl fyri ídnaðar- og handverksvinnuna í Sandoyar Sýslu. ................................................ 38

# 1. Inngangur

Hetta arbeiðsritið setur fokus á Sandoyar Sýslu. Arbeiðsritið viðger í fyrsta lagi gongdina í fólkatalinum í Sandoyar Sýslu, herundir viðurskifti viðvíkjandi til- og fráflyting, burðaravlop og broytingar í aldurs- og kynssamanseting. Lýsing av fólkatalinum og samansetingini hvat viðvíkur aldri og kyni hava stóran týdning, tá støðan í einum øki skal viðgerast. Í tí modernaða samfelagnum er fólkið størsta tilfeingið, júst tí er tað eisini áhugavert at lýsa, hvussu samansetingin av fólki er í Sandoyar Sýslu.

Í øðrum lagi viðger arbeiðsritið vinnuligu støðuna í Sandoyar Sýslu. Hendan viðgerðin er býtt í tvey. Fyrri parturin fevnir um lýsing av tal av parta- og smápartafeløgum. Innan hvørjar vinnur virka feløgini, og hvussu nógv parta- og smápartafeløg eru í Sandoyar Sýslu samanborið við onnur øki í landinum og við støðuna í landinum sum heild. Seinni parturin fevnir um eina lýsing av roknskaparligu gongdini hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu – bæði hjá vinnuni undir einum og býtt í vinnubólkar. Lýsingin fevnir um eina viðgerð av gongdini í bruttovinningi, úrslit áðrenn rentur og úrslit áðrenn skatt, umframt at skuldin og eginognin eisini verður viðgjørd. Somuleiðis vera lyklatøl fyri vinnuna og vinnubólkar lýst.

Tað eru fleiri orsøkir til, at ein lýsing av vinnulívinum í Sandoyar Sýslu er áhugaverd. Fyrst og fremst gevur ein vinnulig lýsing eina mynd av, hvussu støðan á vinnuligu síðuni er. Ein lýsing av hesum slagi gevur eisini eina mynd av, hvussu tað hevur gingist vinnulívinum í Sandoyar Sýslu tey seinastu árini, umframt at ein slík lýsing eisini er ein týdningarmikil partur av metingum um, hvørjar tær sterku og veiku síðurnar í vinnuligum høpi eru, hvørjir vinnuligir møguleikar eru og hvørjar hóttanir eru hjá vinnulívinum í hesum partinum av landinum.

Vitan um, hvussu støðan er í einum øki, bæði hvat viðvíkur tí vinnuliga partinum eins og hvat trivnaði og gongd í fólkatali viðvíkur, er av stórum týdningi, tá tað snýr seg um politiska tilrættarlegging. Tí er ein vinnulig lýsing av Sandoyar Sýslu eisini ein týdningarmikil liður í kommunalu- og landspolitisku planleggingini eins og í planleggingini hjá vinnuni sjálvari.

Í Sandoyar Sýslu hevur avbjóðingin í nógv ár verið at sloppið undan stórum vinnuligum sveiggjum, sum hava stóra ávirkan á fólkið í økinum, og sostatt eisini á gongdina í fólkatalinum. Í hesum sambandi kann ein vinnulig lýsing verða ein týðandi partur, tá leggjast skal til rættis bæði yvir styttri og longri tíarskeið.

Í seinasta parti verða vakstrarmøguleikarnir í Sandoyar Sýslu viðgjørdur. Hesin parturin viðger í fyrstu syftu vakstrarmøguleikarnir, sum teir eru við verandi støðu – og í næstu syftu, hvørja ávirkan ein møguligur undirsjóvartunnil kann fáa á vakstrarmøguleikarnar.

## 2. Háttalag og avmarkingar

Lýsingin av gongdini í fólkatalinum og fólkatalssamansetingini í Sandoyar Sýslu er bygd á hagtøl frá Hagstovu Føroya. Vinnuligi parturin í frágreiðingin er bygdur á tilfar um parta- og smápartafeløg í Sandoyar Sýslu (Sandoy og Skúvoy). Hetta tilfar er fingið til vega frá Skráseting Føroya og frá Business Line. Roknskapartølini frá Business Line fevna um tíðarskeiðið 2002 til 2005. Tilfarið frá Skráseting Føroya er frá árslok 2006.

Harumframt eru egnar kanningar gjørdar fyri at staðfesta, hvørji feløgini eru og hvar tey hoyra heima í vinnuligum hópi[1]. Skráseting Føroya hevur síðan 2005 arbeitt við at flokka parta- og smápartafeløg í landinum, men hetta arbeiðið er ikki komið nakað áleiðis, tí eru flokkingar av parta- og smápartafeløgum í oynni gjørdar út frá egnum kanningum.

Við tað, at lýsingin er grundað á parta- og smápartafeløg, sum eru heimahoyrandi í Sandoynni, førir hetta eisini við sær ta avmarking, at feløg, sum hava deildir í Sandoynni, ikki eru við í lýsingini. Millum annað er hetta galdandi innan fíggjar- og tryggingarheimin, eins og Føroya Tele og oljufeløgini eru skrásett aðrastaðni enn í Sandoynni. Ein onnur avmarking er, at einstaklinga feløg ikki eru við í lýsingini. At m.a. nevndu feløg ikki eru við í lýsingini førir við sær, at hon á summum økjum er ófullfíggjað, tí hesi feløg skapa eitt ávíst virksemi í oynni, gera íløgur í oynni o.s.fr. Hinvegin so fellur eitt møguligt fíggjarligt avkast hjá hesum feløgum ikki í oynni.

Hóast nevndu avmarkingar er yvirlitið yvir parta- og smápartafeløg heimahoyrandi í Sandoy eitt gott grundarlag undir lýsingini av vinnulívinum í oynni. Hetta serliga tá hugsað verður um, at lýsingin eisini hevur til endamáls at vísa á, hvør vinnuligi grundvøllurin í Sandoynni er til at ganga framtíðar avbjóðingum í møti.

Ofta verður ført fram, at eitt lokalt vinnulív er ein partur av fortreytunum fyri at draga til sín fremmandan kapital, antin úr øðrum pørtum av landinum ella uttan úr heimi. Hetta eru eisini viðurskifti, sum gera tað áhugavert at seta fokus á vinnulívið, sum er

[1] Í hesum sambandi hevur BKV Bókhalds og Roknskaparstovan í Sandoynni verið stór hjálp.

heimahoyrandi í Sandoy. Fortreytirnar hjá vinnulívinum í Sandoynni fara tó uttan iva at broytast heilt munandi, um so er at undirsjóvartunnil verður boraður undir Skopunarfjørð. Vegasamband við meginøkið vil helst eisini føra við sær, at týdningurin av einum lokalum vinnulívið í Sandoynni minkar, tí Sandoyggin verður partur av lokal økinum í Suðurstreymoy.

## 2.1. Býtið í vinnubólkar

Í lýsingini av vinnulívinum í Sandoyar Sýslu verður skilt millum feløg innan *Fiskivinnuna*, feløg innan *Handils- og tænastuvinnuna*, og feløg innan *Ídnað og handverk.* Meiri nágreiniligt fevnir bólkingin um hesar vinnur.

| **Fiskivinnan** | **Handils og tænastuvinnan** | **Ídnaðar og handverksvinnan** |
|---|---|---|
| Fiskiskapur | Handil og umvæling | Bygging |
| Fiskavøruídnaður | Gistingarhús og matstovuvirki | Landbúnaður |
| | Sjóflutningur | Skipasmiðjur, smiðjur |
| | Flutningur annars | Annar ídnaður |
| | Vinnuligar tænastur | |
| | Húsarhaldstænastur | |

Hendan bólking er nakað øðrvísi enn vanliga bólkingin hjá Hagstovu Føroya, har skilt verður ímillum *1) Tilfeingisvinnu, 2) Vøruframleiðsluvinnu, og 3) Tænastuvinnu.*

**Hví velja hesa bólking?**

Tað eru fleiri orsøkir til, at ein øðrvísi bólking er vald í hesum arbeiðsritinum. Fiskivinnan er bólkað fyri seg fyri at geva eina greiðari mynd av, hvussu fiskivinnan í Sandoyar Sýslu er fyri. Henda vinnan hevur altíð havt og fer helst eisini í komandi árum at hava stóran týdning fyri samlaðu búskaparligu gongdini í oynni.

Galdandi fyri handils- og tænastuvinnuna í Sandoyar Sýslu er, at ein partur av vinnuni er avskorin frá marknaðinum í restini av landinum. Við øðrum orðum hevur hesin parturin av vinnuni í stóran mun Sandoyar Sýslu sum sín natúrliga marknað, men

merkir tó stóra kapping frá handils- og tænastuvinnuni í miðstaðarøkinum – uttan at bjóða seg nakað serligt fram á marknaðinum har. Tí er tað eisini áhugavert at hyggja at, hvussu hesin parturin av vinnuni í Sandoyar Sýslu er fyri.

Ídnaðar- og handverksvinnan í Sandoyar Sýslu hevur hinvegin størri møguleika at virka á fleiri marknaðum. Umframt at virka í Sandoynni, so kann hendan vinnan eisini virka á øðrum marknaðum, bæði aðrastaðni í landinum og eisini uttanlands.

## 2.2. Aðrar avmarkingar

Hóast Sandoyar Sýsla fevnir um Sandoy, Skúvoy og Stóra Dímun, so verður í arbeiðsritinum ikki skilt millum støðuna í Sandoy og Skúvoy og Stóra Dímun. Í viðgerðini av vakstrarmøguleikunum í Sandoyar Sýslu, verður somuleiðis ikki komið inn á vakstrarmøguleikarnir hjá Skúvoy og Stóra Dímun. Avbjóðingarnar í Skúvoy og í Stóra Dímun – eins og í hinum útoyggjunum – verða viðgjørdar í einari sjálvstøðugari verkætlan (og útgávu) í 2007/2008.

# 3. Fólkatalið í Sandoyar Sýslu

Seinastu ártíggjuni er fólkatalið í Sandoyar Sýslu støðugt minkað. Í 1950 búðu 1.652 fólk í Sandoyar Sýslu. Í tíðarskeiðinum fram til miðskeiðis í 1980árunum vaks fólkatalið nakað, og tá fólkatalið var hægst, búðu 1.805 fólk í Sandoyar Sýslu, hetta var í 1984. Síðan hetta er fólkatalið støðugt minkað, og var minkingin serliga stór fyrst í 1990árunum, hetta orsaka av búskaparkreppuni, sum tá herjaði landið og rakti Sandoynna hart. Gongdin tykist verða stabiliserað í seinnu helvt av 1990árunum, og hevur fólkatalið síðan ligið millum 1.450 og 1.490 fólk. Við ársbyrjan í 2007 búðu 1.470 fólk í Sandoyar Sýslu. Hetta er ein lítil vøkstur í mun til sama tíðarskeið í 2004, 2005 og 2006, men ein minking á 325 fólk í mun til fólkatalið í 1984.

## 3.1. Gongdin árini 1990-2007

Í tíðarskeiðinum frá 1990 til 2007 er fólkatalið í Sandoyar Sýslu minkað við 287 fólkum – , ella góðum 16%. Í sama tíðarskeiði er fólkatalið í Føroyum vaksið við 1%, og gevur hetta sostatt eisini greiða mynd av, at gongdin í fólkatalinum í Sandoyar Sýslu er munandi verri enn í Føroyum sum heild.




Mynd 1. Fólkatalið í Føroyum í Sandoyar Sýslu 1990–2007. 1990=Index 100, tølini eru við ársbyrjan.[2]
*Kelda: Hagstova Føroya*

### 3.1.1. Til- og fráflyting

Orsøkin til minkingina í fólkatalinum í Sandoyar Sýslu er einamest, at talan er um fráflyting, tvs. at fleiri fólk eru flutt úr Sandoyar Sýslu enn til økið. Stóra fráflytingin var serliga í fyrru helvt av 1990árunum. Í tíðarskeiðinum frá 1990 til og við 1997 var netto-fráflytingin úr Sandoyar Sýslu 337 fólk – 983 fólk fluttu úr sýsluni, meðan 646 fólk fluttu til sýsluna[3].

[2] Fyrivarni eigur at takast viðv. tølunum fyri 2007, tí hesi tøl eru í løtuni (fyrst í februar 2007) fyribils tøl frá Hagstovu Føroya.
[3] Legg til merkis, at talan kann vera – og er helst eisini – um, at somu fólk eru flutt úr og til aftur Sandoyar Sýslu í tíðarskeiðinum.




Mynd 2. Tilflyting og fráflyting í Sandoyar Sýslu, árini 1990-2005.

*Kelda: Hagstova Føroya*

Gongdin í til- og fráflytingini hevur verið ymisk frá einum ári til annað í tíðarskeiðinum frá 1998 til 2005, tvs. at nøkur ár eru fleiri fólk flutt til enn úr sýsluni – og umvent. Árini 2004 og 2005 var talan um eina netto-fráflyting, meðan tað í 2003 var ein netto-tilflyting.

## Glottar í 2006

Hóast gongdin í 2004 og 2005 hevur verið skeiva vegin, so eru tó nakrir glottar í 2006. Í 2006 fluttu fleiri fólk til Sandoyar Sýslu enn tað fluttu úr sýsluni. Serliga áhugavert er, at tað er ein hampiliga stór tilflyting til Sandoyar Sýslu uttan úr heimi. Í 2006 fluttu 40 fólk uttan úr heimi til Sandoyar Sýslu, meðan 18 fluttu úr Sandoyar Sýslu og uttanlands – ein nettotilflyting uppá 22 fólk. Í sama tíðarskeiði var eisini talan um eina netto-innlendistilflyting uppá 3 fólk. Sostatt var netto-tilflytingin til Sandoyar Sýslu í 2006 uppá 25 fólk.

**Hví flyta fólk?**

Tað eru fleiri orsøkir til, at fólk flyta úr einum øki í annað økið í landinum ella flyta uttanlands. Ein tann mest vanliga er helst, at ung fólk flyta fyri at fáa sær eina útbúgving. Í dag er tað vorðið alsamt vanligari, at ung fáa sær miðnámsútbúgving og eftir hetta hægri útbúgving, og fyri Sandoyar Sýslu merkir tað, at ein noyðist at flyta, um ikki annað í eitt avmarkað tíðarskeið. Ein onnur orsøk til, at fólk flyta, er eftir arbeiði – talan kann vera um, at ein flytur fyri at fáa eitt betri arbeiði ella eftir einum arbeiði, sum ein hevur áhuga í, ella fyri yvirhøvur at fáa eitt arbeiði. Í triðja lagi, so eru tað eisini nøkur, sum velja at flyta til størri pláss, burtur frá teimum smáu bygdunum við tí avmarkaða bygdarlívinum. Í hesum sambandi hevur sjónvarp og internet stóra ávirkan, m.a. á tann hátt, at útlendskar sjónvarpsrásir varpa ljós á, hvussu tann modernaði lívstílurin í stórbýnum er. Hetta ávirkar eisini valini, sum ung í Føroyum gera á teirri lívsleið.

Ein samanrenning av teimum orsøkunum, sum eru nevndar omanfyri, hevur ført við sær, at ein ávís fráflyting hevur verið úr Sandoyar Sýslu, av útoyggj og eisini úr størri økjum sum t.d. Suðuroy. Avbjóðingin er og hevur leingi verið at fáa fólk at flyta aftur, og spurningurin er so, um støðan í 2006 er tekin um, at gongdin í Sandoyar Sýslu er við at venda.

### 3.1.2. Lágt burðaravlop

Hóast Sandoyar Sýsla varð hart rakt av kreppuni fyrst í 1990árunum, so var burðaravlopið (fødd – deyð = burðaravlop) í Sandoyar Sýslu positivt øll árini frá 1990 til og við 1996. Eftir hetta hevur gongdin verið skiftandi frá einum ári til annað. Gongdin árini 2003, 2004 og 2005 var ikki góð, tí øll árini var talan um eitt negativt burðaravlop. Eins og við flytingarmynstrinum, so eru eisini glottar í smb. við burðaravlopið í 2006, tá burðaravlopið var positivt við 2.

Áhugavert er, at tilsamans hevur burðaravlopið í Sandoyar Sýslu í árunum frá 1990 til 2006 verið positivt við 43. Til samanbering kann nevnast, at í sama tíðarskeiði var burðaravlopið í Suðuroynni positivt við 4.

## 3.2. Ávirkan á aldurs- og kynssamansetingina

Stór fráflyting hevur ávirkan á aldurs- og kynssamansetingina. Hetta hevur eisini verið galdandi í Sandoyar Sýslu, har broytingin í fólkatalinum hevur havt ávirkan á eitt nú lutfallið av yngri fólki.

### 3.2.1. Broytt aldursbýti

Um aldursbýtið í Sandoyar Sýslu í 2006 verður samanborið við aldursbýtið í 1990, so fæst ein greið mynd av, hvørjar broytingar eru farnar fram – sí eisini mynd 3 niðanfyri.




Mynd 3. Aldursbýtið í Sandoyar Sýslu 1990 og 2006. Býtt í 10 ára aldursbólkar.
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Tann yngsti aldursbólkurin – 0-9 ár – er minkaður heilt nógv, úr 17,3% niður í 11,8%. Aldursbólkurin 10-19 ár hevur eisini verið fyri einari minking, hóast hon er munandi minni enn fyri aldursbólkin 0-9 ár. Aldursbólkurin 20-29 ár er í 2006 hinvegin lutfalsliga størri enn hann var í 1990. Ein orsøk er, at árgangurin av teimum 10-19 ára gomlu í Sandoyar Sýslu í 1990 var stórur (eisini tá samanborið verður við tølini fyri

Føroyar sum heild) – og í 2006 eru nøkur av hesum uttan iva at finna í aldursbólkinum 20-29 ár.

Aldursbólkurin 30-39 ár er minkaður munandi í árunum frá 1990 til 2006. Hinvegin eru teir eldru aldursbólkarnir, teir frá 40 og uppeftir, størri í 2006 enn í 1990. Við øðrum orðum vóru tað í 2006 lutfalsliga fleiri eldri fólk í Sandoyar Sýslu enn í 1990. Hetta er eisini ein gongd, sum hevur verið í Føroyum sum heild – sí eisini mynd 4 niðanfyri – men gongdin í Sandoyar Sýslu er tó greiðari. Ein orsøk er, at búskaparkreppan fyrst í 1990árunum hevur styrkt um gongdina skilt soleiðis, at fleiri ung fólk tá fluttu úr Sandoyar Sýslu, og hetta sæst eisini aftur í aldursbýtinum.




Mynd 4. Aldursbýtið í Sandoyar Sýslu og í Føroyum, pr. 1. jan. 2006. Býtt í 10 ára aldursbólkar.
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Um aldursbýtið í Sandoyar Sýslu í 2006 verður samanborið við aldursbýtið í Føroyum, so sæst at aldursbólkurin 0-9 ár er væl minni í Sandoyar Sýslu enn í Føroyum sum heild. Hinvegin er aldursbólkurin 10-19 ár eitt sindur størri í Sandoyar Sýslu. Ein orsøk til

hetta er, at fleiri av teimum einstøku árgangunum í bólkinum 10-19 ár eru lutfalsliga stórir í Sandoyar Sýslu – eisini tá samanborið verður við Føroyar sum heild.

Aldursbólkarnir 20-29 ár, 30-39 ár, og 40-49 ár eri allir minni í Sandoyar Sýslu, enn teir eru í Føroyum sum heild. Hinvegin eru allir aldursbólkar, sum eru 50 ár og eldri, størri í Sandoyar Sýslu enn í Føroyum sum heild. Við øðrum orðum, tá aldursbýtið í Sandoyar Sýslu verður samanborið við aldursbýtið í Føroyum sum heild, so eru tað í stóran mun færri fólk í teimum yngru aldursbólkunum í Sandoyar Sýslu enn í Føroyum sum heild. Hinvegin eru tað fleiri fólk í teimum eldri aldursbólkunum í Sandoyar Sýslu.

### 3.2.2. Kynsbýtið

Í mun til kynsbýtið í flestu londunum í vesturheiminum, har tað eru fleiri kvinnur enn menn, er kynsbýtið í Føroyum tað øvugta – her eru fleiri menn enn kvinnur. Við ársbyrjan 2006 var býtið 52,0% menn, meðan 48,0% vóru kvinnur (Hagstova Føroya). Í Sandoyar Sýslu var býtið "enn skeivari", 54,4% vóru menn, meðan 45,6% vóru kvinnur.

Býtið í Sandoyar Sýslu var longu í 1990 skeivari enn í Føroyum sum heild, men gongdin tey seinastu 15 árini hevur ført við sær eitt enn skeivari býtið. Við ársbyrjan 2006 vóru tað sostatt 127 fleiri menn (785) enn kvinnur (658) í Sandoyar Sýslu – ein munur uppá 19,3% - meðan munurin fyri allar Føroyar var 8,2%.




Mynd 5. Alldurs- og kynsbýtið í Sandoyar Sýslu pr. 1. jan. 2006. Býtt í 10 ára aldursbólkar.
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Um hugt verður eftir alldurs- og kynsbýtinum í Sandoyar Sýslu pr. 1. januar 2006, so eru tað í tí yngsta aldursbólkinum – 0-9 ár – nakað fleiri gentur enn dreingir. Men í aldursbólkunum 10-19 ár og 20-29 ár eru tað væl fleiri menn enn kvinnur. Orsøkin til hetta er helst, at fleiri gentur enn dreingir fara á miðnámsskúla og undir hægri útbúgving, og tískil flyta úr oynni. Í Føroyum sum heild eru tað áleið eins nógvar gentur og dreingir í aldursbólkunum 0-9 ár og 10-19 ár, meðan tað eru fleiri kvinnur enn menn í aldursbólkinum 20-29 ár – tó er skeivleikin ikki eins stórur og í Sandoyar Sýslu.

Í aldursbólkunum 30-39 ár eru at kalla eins nógvar kvinnur og menn í Sandoyar Sýslu – í Føroyum sum heild eru tað í hesum aldursbólkinum fleiri menn enn kvinnur. Í aldursbólkinum 40-49 ár eru fleiri kvinnur enn menn í Sandoyar Sýslu, hetta er áleið sama støðan sum í Føroyum sum heild. Í aldursbólkinum 50-59 ár eru tað væl fleiri menn enn kvinnur í Sandoyar Sýslu. Í Føroyum sum heild eru tað eisini fleiri menn enn

kvinnur í hesum aldursbólkinum, men er munurin tó heilt lítil. Sum heild líkjast teir eldri aldursbólkarnir í Sandoyar Sýslu nógv somu aldursbólkum í Føroyum.

### 3.2.3. Minking í yngru aldursbólkunum

Ein av stóru avbjóðingunum í Sandoyar Sýslu er, at talið av ungum fólki er nógv minkað frá ársbyrjan 1990 til ársbyrjan 2006. Sum nevnt er fólkatalið í Sandoyar Sýslu í hesum tíðarskeiðinum minkað við góðum 16%, men minkingin í aldursbólkinum 0-19 ár er væl størri enn hetta – sí eisini mynd 6 niðanfyri.




Mynd 6. Broyting í aldursbólkunum 0-19 ár, í Føroyum og í Sandoyar Sýslu, árini 1990-2006.
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Í tíðarskeiðinum frá 1990 til 2006 minkað aldursbólkurin av teimum, sum eru 0 – 19 ár við einum triðingi – við 33,4%. Minkingin er væl størri hjá gentum enn hjá dreingjum – 37,7% hjá gentum og 29,2% hjá dreingjum. Minkingin í hesum aldursbólkinum í Sandoyar Sýslu er hartil nógv størri enn minkingin í Føroyum sum heild.

Um hugt verður eftir aldursbólkinum 20-39 ár, so er mynstrið hitt sama. Minkingin í Sandoyar Sýslu er væl størri enn minkingin í Føroyum sum heild, tó at munurin ikki er eins stórur og í aldursbólkinum 0-19 ár – sí eisini mynd 7 niðanfyri.




Mynd 7. Broyting í aldursbólkunum 0-19 ár, í Føroyum og í Sandoyar Sýslu, árini 1990-2006.

*Kelda: Hagstova Føroya.*

Minkingin í aldursbólkinum 20-39 ár er eisini væl størri enn minkingin í samlaða fólkatalinum í Sandoyar Sýslu í árunum 1990 til 2006. Við øðrum orðum eru tað serliga tey yngru, sum eru flutt úr Sandoyar Sýslu í tíðarskeiðinum, og tá tað samstundis eru færri børn fødd, so ávirkar hetta aldursbýtið.

### 3.2.4. Stór minking í talinum av kvinnum í burðarførum aldri

Ein onnur avbjóðing í Sandoyar Sýslu er, at talið av kvinnum í burðarførum aldri – tvs. í aldrinum 15-49 ár – er minkað heilt nógv í árunum 1990 til 2006. Broytingin í aldursbólkinum av teimum 15-49 ára gomlu er rímiliga stór í Sandoyar Sýslu, minkingin er 23,8% í tíðarskeiðinum frá 1990-2006. Í sama tíðarskeiði er hesum aldursbólkurin minkaður við 8,7% í landinum sum heild (Hagstova Føroya)

Minkingin í talinum av kvinnum í hesum aldursbólkinum er størri enn minkingin í talinum av monnum. Hjá kvinnunum er minkingin 24,4%, meðan minkingin hjá monnunum er 23,4%. Við øðrum orðum eru tað í 2006 umleið ein fjórðingur færri kvinnur í burðarførum aldri í Sandoyar Sýslu enn tað vóru í 1990. Minkingin í talinum av kvinnum í hesum aldursbólkinum í Føroyum sum heild var í sama tíðarskeiði 8,4% (Hagstova Føroya).

### 3.2.5. Lutfalsliga lágur føðitíttleiki

Broytingin í lutfallinum av kvinnum í burðarførðum aldri í Sandoyar Sýslu hevur eisini ávirkan á føðitíttleikan, sum tey flestu árini síðan 1990 hevur verið væl lægri enn føðitíttleikin í Føroyum sum heild – undantikin eru tó árini 1995 og 2001.

| | 1990 | 1995 | 2000 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|
| Sandoyar Sýsla | 13,1 | 18,8 | 10,4 | 10,9 | 9,0 |
| Føroyar | 20,0 | 14,7 | 15,4 | 14,7 | 12,6 |

Talva 1. Føðitíttleikin pr. 1.000 íbúgvar í Sandoyar Sýslu og í Føroyum útvald ár
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Talva 1 vísir føðitíttleikan pr. 1.000 íbúgvar í Sandoyar Sýslu og í Føroyum í útvaldum árum. Myndin vísir, at fyri hvørjar 1.000 íbúgvar í Sandoyar Sýslu vórðu í 2006 fødd 9 børn. Sama talið var fyri Føroyar 12,6 børn.

Ein lágur føðitíttleiki vil í stuttum siga, at lutfalsliga fá børn verða fødd. Sum frá líðir vil hetta føra við sær, at lutfallið av ungum fólki gerst lægri, meðan lutfallið av eldri fólki veksur.

## 3.3. Nógv ár við skeivari gongd

Stóra avbjóðingin í Sandoyar Sýslu er at venda teirri skeivu gongdini, sum hevur verið tey seinastu ártíggjuni, tá umræður gongdina og samansetingina í fólkatalinum. Ein framhaldandi gongd við vaksandi lutfalli av fólkinum í teimum eldri aldursbólkunum, færri kvinnum í burðarførum aldri og ein minkandi føðitíttleika kann føra við sær, at Sandoyar Sýsla kemur í eina negativa ringrás, har fólkatalið minkar ár um ár. Við tíðini vil ein nýggj javnvág verða nádd, sum er væl lægri enn tað støðið, við kenna í dag.

Ein partur av loysnini, tá økir hava trupulleikar líkar teimum í Sandoyar Sýslu, er at vinnuligi parturin verður styrktur, soleiðis at øktar og ikki minst spennandi vinnuligar avbjóðingar fáa fólk at støðast og venda aftur til økið. Men hvussu er so vinnuligi grundvøllurin í Sandoyar Sýslu? – Hetta verður viðgjørt í næstu pørtunum.

# 4. Tal av parta- og smápartafeløgum í Sandoyar Sýslu

Í hesum partinum verður talið av parta- og smápartafeløgum viðgjørt og greinað. Greiningin er grundað á tilfar frá Skráseting Føroya, sum lýsir støðuna, sum hon var við árslok 2006.

Hugt verður eftir:

- Hvussu nógv feløg eru í Sandoyar Sýslu.
- Innan hvørjar vinnur virka feløgini.
- Hvussu stór er tilgongdin av feløgum.
- Hvussu er búskaparliga gongdin hjá feløgunum.

Orsøkin til, at tað er áhugavert at hyggja at, hvussu nógv parta- og smápartafeløg eru stovnað í Sandoyar Sýslu, er, at hetta sigur nakað um, um virksemi sum heild er økt, innan hvørjar vinnur virksemi er, og eisini hvar í oynni hetta virksemi er. Somuleiðis sigur talið av stovnaðum parta- og smápartafeløgum eisini nakað um entreprenørskap – um í hvønn mun fólk í Sandoyar Sýslu eru eins ágrýtin at stovna fyritøkur sum fólk í restini av landinum. Ikki minst so sigur hetta eisini eitt sindur um íløguhugin og um í hvønn mun váðafúsur kapitalur er til staðar at stovna nýggj feløg.

## 4.1. Talið av parta- og smápartafeløgum vaksið seinastu árini

Í talvu 2 niðanfyri er eitt yvirlit yvir talið av parta- og smápartafeløgum í Sandoyar Sýslu við árslok 2006. Yvirlitið vísir, hvørja vinnugrein feløgini hoyra til og hvar í oynni, heimstaður felagsins er.

| | Sandur | Skopun | Sandoyar Sýsla Annars | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| **Fiskivinna** | | | | |
| Fiskiskapur | 5 | 4 | 1 | 10 |
| Fiskavøru Ídnaður | 0 | 1 | 0 | 1 |
| **Fiskivinna tils.** | **5** | **5** | **1** | **11** |
| **Handils- og tænastuvinnan** | | | | |
| Handil | 6 | 3 | 3 | 12 |
| Gisting, matstova | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Flutningur | 2 | 0 | 0 | 2 |
| Aðrar tænastur / íløgufeløg | 2 | 1 | 1 | 4 |
| **Handils- og tænstuvinnan tils.** | **10** | **4** | **4** | **18** |
| **Ídnaðar- og handverksvinnan** | | | | |
| Bygging | 4 | 3 | 1 | 8 |
| Landbúnaður | 5 | 1 | 1 | 7 |
| Annar ídnaður | 1 | 1 | 1 | 3 |
| **Ídnaðar- og handverksvinnan tils.** | **10** | **5** | **3** | **18** |
| | | | | |
| **P/F og Sp/f tils.** | **25** | **14** | **8** | **47** |
| | | | | |
| **Stovnaði í 2006** | **4** | **1** | **1** | **6** |

Talva 2. Tal av Parta- og smápartafeløgum í Sandoynni 31.12 2006
*Kelda: Skráseting Føroya, 4. januar 2007.*

Sambært Skráseting Føroya vóru tað 47 partafeløgum í Sandoy og Skúvoy[4] (onki í Stóra Dímun) við árslok 2006, meðan talið av partafeløgum við ársbyrjan 2000 var um 20 feløg. Í tíðarskeiðinum frá 2000 til 2006 eru 30 parta- og smápartafeløg stovnaði við heimstaði í Sandoyar Sýslu. Í sama tíðarskeiði eru nøkur fá feløg strikaði úr skránni. Í árunum 2000 til og við 2002 vórðu 2 feløg stovnaði á hvørjum ári, ella tilsamans 6 feløg í tíðarskeiðinum. Í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2006 vórðu lutfalsliga nógv feløg stovnaði, 5 - 7 feløg um árið og 24 tilsamans. Av hesum vóru 5 innan fiskiveiðu, 5 innan handil, 5 skrásett innan bygging, meðan heili 7 feløg vórðu skrásett innan landbúnað. 2 vórðu so skrásett innan aðrar vinnugreinar.

Í 2006 vórðu 6 feløg stovnaði í Sandoynni. 3 feløg innan landbúnað, 2 innan bygging og 1 felag innan handil.

[4] Felagið, sum varð heimahoyrandi í Skúvoy, varð niðurlagt fyri stuttari tíð síðani .

Ein lítil fjórðingur ella 11 feløg vóru við árslok 2006 skrásett innan fiskivinnuna. Talið av feløgum, ið vórðu skrásett innan bólkarnar Handil- og tænastuvinna og Ídnaður- og handverksvinna var eins stórt, 18 feløg í hvørjum bólki.

Av teimum 47 feløgum, ið vórðu skrásett í Sandoyar Sýslu við árslok 2006, vóru 25 skrásett heima á Sandi, 14 í Skopun, meðan 8 vórðu skrásett aðrastaðni í sýsluni.

Innan fiskivinnuna vórðu øll uttan eitt (Sandoy Seafood) skrásett innan fiskiveiðu. Annars er áhugavert, at heili 7 av feløgunum innan ídnaðar- og handverksvinnuna vórðu skrásett við endamálinum *Landbúnaður*. 8 feløg vórðu skrásett innan Bygging. Somuleiðis vórðu 12 feløg skrásett innan handilsvinnuna. Onki felag í Sandoyar Sýslu er skrásett innan gisting- og matstovuvinnu, hóast matstova er í oynni.

**Í mun til Suðuroy, fá feløg innan handils- og tænastuvinnuna**

Meðan býtið av feløgum í Sandoynni innan teir tríggjar høvuðsbólkarnar *Fiskivinnuna, Handils- og tænastuvinnuna,* og *ídnaðar- og handverksvinnuna* er ávikavist 24%, 38%, 38%, so er sama býtið í Suðuroynni 23%, 55%, 22%. Hetta vísur, at talið av feløgum innan fiskivinnuna er lutfalsliga tað sama í báðum økjunum. Hinvegin eru lutfalsliga fleiri feløg innan handil og tænastur í Suðuroynni. Ein orsøk er ivaleyst, at marknaðurin og harvið grundarlagið fyri lønandi rakstri hjá feløgum innan handils- og tænastuvinnuna er størri í Suðuroynni enn í Sandoynni. Samanborið við í Suðuroy eru tað hinvegin lutfalsliga nógv feløg innan landbúnað í Sandoyar Sýslu – 7 feløg í Sandoy ímóti 2 í Suðuroy.

Galdandi fyri bæði ídnaðar- og handsverksvinnuna og handilsvinnuna er, at virkini eru smá við fáum arbeiðsplássum. Hetta viðførir, at mest sum ongi lærupláss eru í hesum vinnum í oynni. Hetta kann eisini staðfestast við at hyggja eftir tilgongdini av lærlingum úr Sandoy. Samlaða talið av lærlingum fyri alt Føroyar var í tíðarskeiðinum frá ársbyrjan fram til september 2006 omanfyri 300 lærlingar. Av teimum vóru bert 3 búsitandi í Sandoyar Sýslu (Yrkisdepilin, 2006).

**Landbúnaðurin væl umboðaðar**

Sum nevnt eru heili 7 av 47 parta- og smápartafeløgum í Sandoyar Sýslu skrásett sum feløg innan landbúnaðin. Sostatt er landbúnaður ein vinna, ið lutfalsliga er væl umboðað í Sandoyar Sýslu, og er Sandoyggin eisini yvirhøvur væl egnað til landbúnað. Av teimum 7 parta- og smápartafeløgunum innan landbúnað eru 3 skrásett í 2005 og 4 eru skrásett í 2006. Hetta kemst ikki av, at landbúnaðarvinnan er vaksin munandi tey seinastu árini, men er hetta helst eitt tekin um, at raksturin av landbúnaðinum er betri skipaður tey seinastu árini.

## 4.2. Lutfalsliga fá feløg stovnað í Sandoyar Sýslu

Í 2006 vórðu tilsamans 433 parta- og smápartafeløg stovnaði í Føroyum. Av hesum vóru 6 heimahoyrandi í Sandoyar Sýslu. Um fólkatalið verður brúkt sum útgangsstøði, so búðu tað við ársbyrjan í 2007 1.470 fólk í Sandoyar Sýslu, svarandi til 3,0% av fólkinum í Føroyum. Lutfallið av stovnaðum parta- og smápartafeløgum, sum eru heimahoyrandi í Sandoyar Sýslu, var í 2006 umleið 1,4%. Við fólkatalinum sum samanberingargrundarlag vórðu sostatt lutfalsliga fá feløg stovnaði í Sandoyar Sýslu í 2006. Hetta er eisini støðan, tá samanborið verður við samlaða talið av parta- og smápartafeløgum í landinum. Við árslok 2006 vóru tað 2.465 parta- og smápartafeløg í Føroyum. Av hesum vóru 47 heimahoyrandi í Sandoyar Sýslu, svarandi til 1,9%.

Eisini samanborið við Suðuroy, sum er eitt annað økið í landinum, ið hevur merkt niðurgongd seinastu ártíggjuni, eru tað lutfalsliga fá feløg stovnaði í Sandoyar Sýslu. Umroknað til tal av stovnaðum feløgum pr. 1.000 íbúgvar vórðu 4,16 feløg stovnaði pr. 1.000 íbúgvar í Sandoyar Sýslu í 2006. Í Suðuroynni vórðu 34 feløg stovnaði í 2006, svarandi til 6,87 feløg pr. 1.000 íbúgvar í Suðuroy. Somu tøl vóru fyri alt landið 433 stovnaði feløg, svarandi til 8,98 feløg pr. 1.000 íbúgvar í Føroyum. Við øðrum orðum vórðu lutfalsliga færri feløg stovnaði í Sandoyar Sýslu og í Suðuroy enn í Føroyum sum heild.

Eitt er hvussu nógv parta- og smápartafeløg eru í Sandoyar Sýslu. Ein annar týðandi táttur er, hvussu hevur tað gingist roknskaparliga hjá hesum feløgum tey seinastu árini.

# 5. Roknskapartøl fyri Sandoy

Í hesum partinum verða viðgjørd roknskapartøl fyri parta- og smápartafeløgini í Sandoyar Sýslu í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005. Talan er um roknskapartilfar hjá 37 feløgum, og eru tey bólkaði í 3 bólkar: fiskivinna, handils- og tænastuvinna og ídnaðar- og handverksvinna.

## 5.1. Bruttovinningur

**Bruttovinningurin er tann partur av vinninginum, ið er eftir til m.a. starvsfólkakostnað.**

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskivinnan | 65.935.000 | 49.825.000 | 31.079.000 | 46.578.000 |
| Handils- og tænastuvinnan | 11.424.000 | 11.503.000 | 11.358.000 | 10.486.000 |
| Ídnaðar- og handverksvinnan | 2.086.000 | 3.203.000 | 2.973.000 | 3.493.000 |
| **Sandoyar Sýsla tilsamans** | **79.445.000** | **64.531.000** | **45.410.000** | **60.557.000** |

Talva 3. Bruttovinningurin hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005.
*Keldur: Business Line og egnar kanningar*

Um hugt verður eftir bruttovinninginum hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu undir einum (talva 3 omanfyri), so minkar samlaði bruttovinningurin í árunum frá 2002 til 2004 við heili 34 mill. kr. Men bruttovinningurin hækkar síðani við 15 mill. kr. frá 2004 til 2005. Minkingin er øll at finna innan fiskivinnuna. Minkingin sæst eisini aftur í lønarhagtølunum, har samlaðu lønirnar í privatu vinnuni minkaðu við 25 mill. kr. í sama tíðarskeiði (Hagstova Føroya).

Gongdin í bruttovinninginum hjá handils- og tænastuvinnuni er nøkulunda støðug í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2004 – øll árini um 11,5 mill. kr. Men í 2005 minkar bruttoviningurin tó nakað,niður á 10,5 mill. kr.

Gongdin í ídnaðar- og handsverksvinnuni hevur eisini verið jøvn, og um árið 2002 verður tikið burturúr, so hevur bruttovinningurin ligið millum 3 og 3,5 mill. kr. í tíðarskeiðinum frá 2003 til 2005.

## 5.2. Úrslit áðrenn rentur

**Úrslit áðrenn rentur er úrslitið, sum er eftir til at forrenta fremmandakapitalin (lániskuldina) og eginognina.**

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskivinnan | 13.875.000 | 7.342.000 | -4.347.000 | -12.000 |
| Handils- og tænastuvinnan | 1.208.000 | 909.000 | 909.000 | 463.000 |
| Ídnaðar- og handverksvinnan | 237.000 | 341.000 | 49.000 | 308.000 |
| **Sandoyar Sýsla tilsamans** | **15.320.000** | **8.592.000** | **-3.389.000** | **759.000** |

Talva 4. Úrslit áðrenn rentur hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005.
*Keldur: Business Line og egnar kanningar*

Um hugt verður eftir samlaðu úrslitunum áðrenn skatt og úrslitunum áðrenn rentur er gongdin í "inntjeningsevninum" hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu frá 2002 til 2005 ikki góð. Samlaða úrslitið áðrenn rentur minkar frá einum avlopi uppá 15,5 mill. kr. í 2002 til eitt hall í 2004 uppá góðar 3,3 mill. kr. – við øðrum orðum er tað rakstrarliga onki eftir til rentur og avlop í 2004. Í 2005 gerst úrslitið áðrenn rentur aftur positivt, uml. 0,7 mill. kr.

Í tíðarskeiðinum er tað serliga innan fiskivinnuna, at stórir broytingar eru farnar fram. Frá at hava eitt avlop uppá 13,8 mill. kr. í 2002 hevði fiskivinnan eitt hall í bæði 2004 og í 2005 – hallið í 2004 var 4,3, mill. kr., meðan talan var um eitt heilt lítið hall í 2005. Eisini gongdin innan handils- og tænastuvinnuna fer skeiva vegin. Vinnan hevði eitt avlop áðrenn rentur uppá 1,2 mill. kr. í 2002, men avlopið minkaði niður í slaka ½ mill. kr. í 2005.

Gongdin innan ídnaðar- og handverksvinnuna hevur verið nøkulunda støðug í árunum frá 2002 til 2005, hóast avlopið áðrenn rentur minkar niður í nærum onki í 2004, so var hini árini talan um eitt avlop áðrenn rentur upp á umleið 300.000 kr.

## 5.3. Úrslit áðrenn skatt

**Úrslit áðrenn skatt er úrslitið, sum er eftir til skatt og til at forrenta eginognina.**

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskivinnan | 15.602.000 | 9.176.000 | -5.529.000 | -1.312.000 |
| Handils- og tænastuvinnan | 1.405.000 | 1.310.000 | 1.085.000 | 480.000 |
| Ídnaðar- og handverksvinnan | 318.000 | 188.000 | 96.000 | 263.000 |
| **Sandoyar Sýsla tilsamans** | **17.325.000** | **10.674.000** | **-4.348.000** | **-569.000** |

Talva 5. Úrslit áðrenn skatt hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005.
*Keldur: Business Line og egnar kanningar*

Samlaða úrslitið áðrenn skatt var í 2002 uml. 17,3 mill. kr. – sí eisini talvu 4 omanfyri. Síðani minkar úrslitið munandi tey næstu 2 árini, og í 2004 var samlaða úrslitið áðrenn skatt negativt við uml. 4,3 mill. kr. Úrslitið gjørdust nakað betur í 2005, tá samlaða hallið var upp á gott og væl 0,5 mill. kr. Sostatt megnaði vinnan í Sandoyar Sýslu undir einum ikki at forrenta eginognina í 2004 ella í 2005.

Áhugavert er, at í 2002 og í 2003 hevði vinnan undir einum større avlop áðrenn skatt, enn avlopið áðrenn rentur. Hetta merkir, at vinnan hevði fíggjarligar inntøkur av t.d. innistandandi í peningastovnum ella kapital inntøkur av íløgum í øðrum feløgum. Í 2002 og í 2003 er tað serliga fiskivinnan, sum hevur fíggjarligar inntøkur, ið førdu við sær størri avlop áðrenn skatt enn avlop áðrenn rentur. Í árunum 2004 og 2005 var hallið áðrenn skatt tó størri enn hallið áðrenn rentur, og merkir hetta, at vinnan undir einum hevði størri fíggjarligar útreiðslur enn fíggjarligar inntøkur.

Handils- og tænastuvinnan hevði eisini størri avlop áðrenn skatt enn avlop áðrenn rentur – og fyri handils- og tænastuvinnuna er hetta galdandi fyri alt tíðarskeiðið frá 2002 til 2005. Gongdin hjá ídnaðar- og handverksvinnuni var hinvegin skiftandi í tíðarskeiðinum.

### 5.3.1. Úrslit eftir skatt

Í samband við útrokning av lyklatalinum "eginognaravkast" (sí part 5.5. niðanfyri) verður úrslit eftir skatt brúkt sum partur av útrokningarháttinum. Av hesi orsøk er úrslit eftir skatt áhugavert – og sett upp í talvuni niðanfyri. Úrslitið eftir skatt vísir eisini í hvønn mun vinnan megnar at forrenta eginognina.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskivinnan | 10.409.000 | 7.716.000 | -5.458.000 | -1.517.000 |
| Handils- og tænastuvinnan | 1.257.000 | 1.154.000 | 937.000 | 349.000 |
| Ídnaðar- og handverksvinnan | 238.000 | 39.000 | -3.000 | 221.000 |
| **Sandoyar Sýsla tilsamans** | **13.904.000** | **8.909.000** | **-4.524.000** | **-947.000** |

Talva 6. Úrslit eftir skatt hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005.
*Keldur: Business Line og egnar kanningar*

## 5.4. Skuld og eginogn[5]

**Skuld**

Samlaða skuldin hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu vaks frá uml. 51,7 mill. kr. í 2002 til uml. 70,7 mill. kr. í 2004. Øll hækkingin er at finna innan fiskivinnuna. Skuldin lækkar tó aftur í 2005, tá skuldin var 59,1 mill. kr. Eisini øll lækkingin í skuldini er at finna innan fiskivinnuna. Sí eisini talvu 7. niðanfyri.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskivinnan | 40.048.000 | 41.119.000 | 57.793.000 | 47.122.000 |
| Handils- og tænastuvinnan | 9.413.000 | 9.953.000 | 10.229.000 | 9.202.000 |
| Ídnaðar- og handverksvinnan | 2.244.000 | 3.784.000 | 2.673.000 | 2.746.000 |
| **Sandoyar Sýsla tilsamans** | **51.705.000** | **54.856.000** | **70.695.000** | **59.070.000** |

Talva 7. Skuldin hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005.
*Keldur: Business Line og egnar kanningar*

Skuldin innan fiskivinnuna hækkar í tíðarskeiðinum frá 2002 fram til 2005 við uml. 7 mill. kr., soleiðis at samlaða skuldin í fiskivinnuni í 2005 var góðar 47 mill. kr. Ein av

[5] Eginognin kann fevna um partapening, fluttan vinning, uppskrivingar, tiltakspening o.s.fr.

orsøkunum til hækkingina er roknskaparligar bókingar, sum føra við sær, at eginogn verður flutt til skuld – við øðrum orðum, at ætlanin er at gjalda út eginognina.

Skuldin innan fiskivinnuna í Skopun hækkar við heili 25 mill. kr. frá 2002 fram til 2004, tá skuldin var knappliga 42 mill. kr. Skuldin minkar tó niður í 30 mill. kr. í 2005. Av hækkingini fram til 2004 stava 20 mill. kr. frá eini hækking av skuldini hjá Sandoy Seafood (sum er skrásett í Skopunar kommunu), serliga í smb. við fígging av nýíløgum. Síðani minkar skuldin í Sandoy Seafood við 9 mill. kr. í 2005 í smb. Við, at skuld verður eftirgivin, og nýggjur peningur kemur inn í felagið. Í 2005 var skuldin í Sandoy Seafood góðar 22 mill. kr.

Umframt at skuldin í Sandoy Seafood ávirkar samlaðu tølini fyri skuldini hjá fiskivinnuni í Skopun, so eru íløgur eisini gjørdar í 4 minni fiskifør í tíðarskeiðinum.

Skuldin innan fiskivinnuna í *Sandoy Annars* í 2002 var 14 mill. kr. Men minkar skuldin niður í 0 í 2003, og er skuldin eisini 0 í 2004 og 2005. Orsøkin til hetta er, at Lido Seafood í Skálavík fór á húsagang í tíðarskeiðinum.

Skuldin innan handils- og tænastuvinnuna er nøkulunda støðug í árunum 2002 til 2005 – og er í 2005 lægri enn í 2002, hóast skuldin í 2003 og 2004 hækkaði nakað í mun til skuldina í 2002. Skuldin hjá handils- og tænastuvinnuni var við árslok 2005 umleið 9,2 mill. kr.

Skuldin hjá ídnaðar- og handverksvinnuni veksur í tíðarskeiðinum. Talan er um ein vøkstur uppá uml. 0,5 mill. kr., soleiðis at skuldin í 2005 var umleið 2,7 mill. kr.

**Eginogn**

Frá 2002 til 2003 veksur eginognin í vinnuni við 12 mill. kr., frá uml. 69,3 mill. kr. til 81,7 mill. kr. Eginognin veksur í 2002 og 2003 í mestsum øllum vinnum og hartil í allari oynni. Men frá 2003 til 2004 minkar eginognin við 18 mill. kr. Øll minkingin er at finna innan fiskivinnuna á Sandi og í Skopun. Ein partur av minkingini er orsakað av halli av rakstri, meðan ein størri partur er flyting av eginogn til skuld. Hugsandi er, at

orsøkin til hetta er, at feløg hava selt aktivini og hava gjørt av at luta eginognina út sum vinningsbýti – og tí verður hetta roknskaparliga bókað sum skuld. Frá 2004 til 2005 veksur eginognin við góðum 2 mill. kr.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Fiskivinnan | 59.321.000 | 69.935.000 | 51.182.000 | 52.797.000 |
| Handils- og tænastuvinnan | 7.469.000 | 8.613.000 | 9.550.000 | 9.911.000 |
| Ídnaðar- og handverksvinnan | 2.522.000 | 3.157.000 | 3.160.000 | 3.381.000 |
| **Sandoyar Sýsla tilsamans** | **69.312.000** | **81.705.000** | **63.892.000** | **66.089.000** |

Talva 8. Eginogn hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í árunum 2002-2005.
*Keldur: Business Line og egnar kanningar*

Leggjast kann afturat, at ein sera stórur partur av eginognini í fiskivinnuni í Sandoyar Sýslu er at finna í tveimum feløgum, ið ikki longur hava nakað aktiv. Talan er um feløgini, ið áttu partrolararnir Columbus og Nornagest, sum vórðu seldir (til eitt felag í Vestmanna) í august 2005. Sostatt hava hesi feløg eina sera stóra eginogn, men ongi aktiv og ongi fiskiloyvi. Í løtuni er bert eitt "stórt" fiskiloyvi eftir í Sandoynni, og tað er partrolaraloyvið hjá Eysturbúgvanum, ið partrolar saman við Vesturbúgvanum (sum eitt felag í Vestmanna eigur). Eysturbúgvin hevur í nógv ár saman við Columbus og Nornagesti verið høvuðsveitari av rávøru til Sandoy Seafood.

Samanumtikið kann sigast, at samlaða fíggjarliga gongdin hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu frá 2002 til 2004 ikki er góð. Samlaða avlopið hjá vinnuni er negativt, og samstundis sum eginognin minkar, veksur skuldin. Frá 2004 til 2005 broytist gongdin til tað betra, og er so spurningurin, um hendan gongdin heldur áfram í 2006. Minkandi talið av fiskiloyvum er tó eitt vandamál fyri eitt øki, sum í so stóran mun er eitt fiskivinnu- og fiskiframleiðsluøki.

**Sandoy Seafood**[1]
Í Sandoynni eru tvey størri fiskavirkir, eitt í Skopun og eitt heima á Sandi. Virkið í Skopun varð dagført munandi beint undan búskaparkreppuni fyrst í 1990árunum, men í kjalarvørrinum av kreppuni blivu bæði virkini í Sandoynni stongd, og førdi hetta m.a. við sær, at nógv fólk gjørdist arbeiðsleys. Virkini blivu bæði – eins og nógv onnur virkir í landinum – partur av Føroya Fiskavirking, og endaðu hesi virkini saman við fleiri øðrum virkjum í landinum í sokallaða mølposanum hjá Føroya Fiskavirking. Seinni yvirtók Føroya Banki mølposan og sostatt eisini virkini í Sandoynni.
Í kreppuárunum fyrst í 1990árunum var Sandoyggin eitt av økjunum, ið varð harðast rakt. Ásannandi tað stóru kreppuna í Sandoynni játtaði Føroya Løgting í 1995 3 mill. kr. sum stuðul til eina møguliga verkætlan innan fiskivinnuna á landi í Sandoynni. Hetta tiltak varð síðani kent sum "Sandoyarætlanin".

Í 1995 varð Delta Seafood á Tvøroyri sett á stovn. Felagið fekk eina góða byrjan, og tíðliga í 1997 hevði felagið ætlanir um at víðka um virksemi. Í hesum sambandi vóru virkini í Sandoynni tikin við í viðgerðina sum eitt alternativ, tí mestsum allir karmarnir vóru har. Delta Seafood stovnaði í 1997, saman við arbeiðarafeløgunum í Sandoynni, Vinnugrunninum í Sandoynni og Havnar Timburhandli, felagið Sandoy Seafood. Nýstovnaða felagið søkti um stuðulin (Sandoyarætlanin) frá Føroya Løgtingi og fekk játtandi svar.

Felagið leigaði síðani bæði virkini í oynni frá Føroya Banka (og keypti í 2003 bæði virkini), og fór miðvíst undir at gera virkini klár til framleiðslu. Í september 1997 var klárt at fara í gongd, og felagið hevur í 2007 sostatt 10 ár á baki. Í hesum tíðarskeiði hevur felagið havt sera stóran týdning fyri Sandoynna. Felagið hevur t.d. goldið uml. 20 mill. kr. í beinleiðis lønum um árið (Business Line), og rundar felagið í ár (2007) væntandi 200 mill í beinleiðis lønum. Hartil koma so lønirnar í avleiddum virksemi, ið eisini hava stóran týdning fyri økið.

## 5.5. Lyklatøl fyri Sandoyar Sýslu

Í undanfarnu pørtum eru uppsett úrslit eftir skatt, úrslit áðrenn skatt, úrslit áðrenn rentur, skuld og eginogn fyri vinnuna í Sandoyar Sýslu. Hesi úrslit verða brúkt í smb. við útrokning av nøkrum lyklatølum, ið vanliga verða nýtt til at lýsa gongdina hjá einum virki ella hjá einari vinnu. Lyklatølini, sum talan er um, eru *ognaravkast*, *eginognaravkast* og *soliditetur*. Í hesum partinum verða lyklatøl fyri vinnuna í Sandoyar Sýslu viðgjørd.

**Ognaravkast**

Ognaravkast er lyklatal, ið setur rakstrarstøðuna upp ímóti fíggjarstøðuni. Úrslit áðrenn rentur, ið er tann parturin av rakstrinum, sum er eftir til at gjalda kostnað / rentu av

fremmandakapitali (t.d. rentu av lánum og kreditorskuld) og til broyting av eginognini, verður sett upp ímóti samlaða kapitalinum. Ognaravkastið vísir sostatt í hvønn mun felagið/vinnan megnar at forrenta tann samlaða kapitalin t.v.s. bæði fremmandakapital og eginkapital.

| | |
|---|---|
| **Ognaravkast**: | Úrslit áðrenn rentur x 100<br>Skuld + Eginogn |

**Eginognaravkast**

Eginognarsavkast er lyklatal, ið setur tann partin av rakstrinum, ið er eftir til at forrenta eginognina, upp ímóti sjálvari eginognini. Lyklatalið vísur í hvønn mun felagið megnar at forrenta tað, ið eigarin/eigarar hevur/hava bundið í virksemi.

| | |
|---|---|
| **Eginognaravkast**: | Úrslit eftir skatt x 100<br>Eginogn |

**Soliditetur**

Soliditeturin er lyklatal, ið setur eginognina upp ímóti samlaðu fíggjarstøðuni. Lyklatalið vísir, hvussu stór eginognin er lutfalsliga. Umframt at lyklatalið eisini vísir evnini hjá felagnum/vinnuni at standa ímóti tapi.

| | |
|---|---|
| **Soliditetur**: | Eginogn x 100<br>Skuld + Eginogn |

### 5.5.1. Lyklatøl fyri vinnuna í Sandoyar Sýslu

Til at lýsa búskaparligu gongdina hjá vinnuni í oynni eru niðanfyri roknaði lyklatøl hjá samlaðu vinnuni í oynni umframt hjá teimum einstøku vinnubólkunum.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ognaravkast | 12,7% | 6,3% | -2,5% | 0,6% |
| Eginognaravkast | 20,1% | 10,9% | -7,1% | -1,4% |
| Soliditetur | 57,3% | 59,8% | 47,5% | 52,8% |

Talva 9. Lyklatøl fyri vinnuna í Sandoyar Sýslu tilsamans.

Í talvu 9 omanfyri eru lyklatølini fyri vinnuna í Sandoyar Sýslu undir einum sett upp fyri tíðarskeiðið 2002 til 2005.

Lyklatølini geva eina mynd av, at vinnan í Sandoyar Sýslu í 2002 hevði rímiliga góð "inntjeningevni". Vinnan megnar at gjalda hvørjum sítt umframt at veksa um eginognina. Í 2003 gerast úrslitini heldur lakari, men framvegis megnar vinnan at veksa um eginognina. Eginognin veksur lutfalsliga meira enn skuldin. Hetta sæst av, at soliditetsgradurin veksur. Men í 2004 gongst illa hjá vinnuni. Vinnan megnar í hesum tíðarskeiði ikki at forrenta fremmandakapitalin (lániskuldina) og eginognina. Hetta viðførir, at skuldin veksur, meðan eginognin minkar. Úrslitið er, at soliditeturin minkar munandi. Í 2005 er ognaravkastið nærum 0%, meðan eginognarsavkastið er negativt. Alt annað líka skuldi hetta viðført, at soliditeturin minkaði, men við tað at nýggjur partapeningur verður skotin inn í fiskivinnuna, umframt at skuld verður eftirgivin, so ávirkar hetta soliditetin positivt bæði fyri fiskivinnuni (sí niðanfyri) og vinnuni undir einum.

**Fiskivinnan**

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ognaravkast | 14,0% | 6,6% | -4,0% | -0,0% |
| Eginognaravkast | 20,9% | 11,0% | -10,7% | -2,9% |
| Soliditetur | 59,7% | 63,0% | 47,0% | 52,8% |

Talva 10. Lyklatøl fyri fiskivinnuna í Sandoyar Sýslu.

Fiskivinnan er tann vinnan, ið fyllir allarmest í Sandoynni, bæði hvat viðvíkur støðd á roknskapartølum, og eisini hvat viðvíkur arbeiðsplássum. Tað at fiskivinnan fyllir nógv í roknskaparhøpi, ger, at gongdin í lyklatølunum hjá samlaðu vinnuna er lík gongdini í lyklatølunum hjá fiskivinnuni. Sum lyklatølini í talvu 10 vísa, so minkar samlaði

vinningurin í fiskivinnuni niður í onki í árunum frá 2002 til 2005 og verður enntá til hall bæði í 2004 og 2005. Tó skal nevnast, at úrslitið batnar frá 2004 til 2005. Tann vánaliga gongdin frá 2003 til 2004 viðførir, at soliditeturin minkar serliga nógv frá 2003 til 2004. At soliditeturin veksur frá 2004 til 2005, hóast fiskivinnan hevur hall, er sum áður nevnt orsaka av, at nýggjur partapeningur verður settur í fiskivinnuna, umframt at skuld verður eftirgivin.

Skuldin í fiskivinnuni er sum nevnt vaksin við uml. 7 mill. kr. í tíðarskeiðinum. Samstundis er eginognin minkað við 7 mill. kr. Hetta ger, at soliditeturin í vinnuni minkar við uml. 7 prosent-pointum. Hóast soliditeturin minkar, so kann nevnast, at soliditeturin er omanfyri 50% mest sum øll árini. Hetta merkir, at samlaða eginognin er størri enn samlaða skuldin.

### Handils- og tænastuvinnan

Roknskapar- og lyklatølini fyri handils- og tænastuvinnuna vísa, at vinnan hevur eina javna afturgongd í inntjening fyri alt tíðarskeiðið frá 2002 til 2005. Økta kappingin frá handilsvinnuni í miðstaðarøkinum saman við einum alsamt minkandi fólkagrundarlagi ger, at vinnan, ið mest sum bara røkir heimamarknaðin, hevur avmarkaðar møguleikar at forvinna pening[6]. Møguleikarnir fyri einari menning í sjálvari oynni eru smáir. Fast samband kann bøta um møguleikarnir hjá vinnuni við tað, at stóra kundagrundarlagið í meginøkinum hevur betri atgongd til handilsvinnuna í oynni. Hinvegin fáa handlarnir í Sandoynni við hesum eisini størri kapping, tí kundar teirra fáa betri atgongd til stóru handilsvinnuna í miðstaðarøkinum.

[6] Ein fyritøka í Skopun hevur tó tikið upp kappingina og bygt nýggjan handilsdepil í Skopun, sum lat upp í mai 2006. Í handilsdeplinum *Lonin* – sum er meinlíkur bygninginum Inn á Norðskála – húsast matvøruhandilin *Sparni*, ein hárfríkanarstova og Telebúðin hjá Føroya Tele (Dimmalætting, 23. mai 2006).

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ognaravkast | 7,2% | 4,9% | 4,6% | 2,4% |
| Eginognaravkast | 16,8% | 13,4% | 9,8% | 3,5% |
| Soliditetur | 44,4% | 46,4% | 48,3% | 51,9% |

Talva 11. Lyklatøl fyri handilsvinnuna í Sandoyar Sýslu.

Bæði ognaravkast og eginognaravkast minka javnt frá 2002 til 2005. Í 2002 eru bæði ognar- og eginognaravkast á rímiliga høgum støði. Í 2005 eru bæði ognar- og egionognaravkast hinvegin komin niður at eitt lágt støði. Tað sum “bjargar” vinnuni er, at skuldin er lítil. Hetta sæst eisini aftur í einum veksandi soliditeti, hóast minkandi inntjeningsevni.

Sum er hevur handilsvirksemi størri roknskaparliga stødd (volumu) enn ídnaðar- og handverksvinnan. Men tað er kanska bert spurningur um tíð, áðrenn hetta broytist, tí vakstrarpotentiali í ídnaðar- og handverksvinnuni er størri enn í handilsvinnuni. Ein orsøk er, at ídnaðar- og handverksvinnan hevur betri umstøður at pendla og harvið størri møguleika at bjóða seg fram á øðrum marknaðum enn handilsvinnan.

**Ídnaðar- og handverksvinnan**

Gongdin í inntjening hjá ídnaðar- og handverksvinnuni er tann sama sum í fiskivinnuni. Ein niðurgongd í árunum 2002 til og við 2004 og síðani aftur ein uppgongd frá 2004 til 2005. Skuldin er í sama tíðarskeiði vaksin nakað, men eginognin er vaksin lutfalsliga meira enn skuldin. Hetta ger, at soliditeturin veksur frá 2002 til 2005. Men tølini hjá vinnuni eru í heila tikið smá. Samlaða eginognin er bert 3,4 mill.

| | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Ognaravkast | 5,0% | 4,9% | 0,8% | 5,0% |
| Eginognaravkast | 9,4% | 1,2% | -0,1% | 6,5% |
| Soliditetur | 52,9% | 45,5% | 54,2% | 55,2% |

Talva 12. Lyklatøl fyri ídnaðar- og handverksvinnuna í Sandoyar Sýslu.

Ognaravkastið minkar niður í onki frá 2002 til 2004. Í 2004 er ognaravkastið so lítið, at vinnan neyvan forrentar allan fremmandakapitalin. Síðani veksur ognaravkastið í 2005 upp á sama støði sum í 2002.

Eginognaravkasti minkar eisini frá 2002 til 2004. Í 2004 er eginognaravkasti negativt, og hetta ber boð um, at vinnan hetta árið ikki megnar at forrenta eginognina.

Soliditeturin minkar frá 2002 til 2003 orsaka av minkandi inntjening. Men hóast minkandi inntjening frá 2003 til 2004, so veksur soliditeturin. Hetta er orsakað av, at eitt av byggivirkinum við eini skuld uppá uml. 1 mill og eini eginogn uml. 0 riggar av í tíðarskeiðinum. Soliditeturin veksur aftur frá 2004 til 2005 orsakað av veksandi inntjening í vinnuni.

Í eini samanbering við Suðuroynna er vert at leggja til merkis, at ídnaðar- og handverksvinnan í Suðuroynni hevði eina niðurgongd frá 2002 til 2003, meðan ein størri uppgongd hevur verið frá 2003 til 2005. Í Sandoynni helt niðurgongdin frá 2002 til 2003 fram til 2004 og síðani kom uppgongdin í vinnuni. Hetta kundi bent á, at ídnaðar- og handverksvinnan í Sandoynni ikki í sama mun sum t.d. vinnan í Suðuroynni hevur luttikið í tí stóra virkseminum, ið hevur verið eitt nú í miðstaðarøkinum.

## 5.6. Vinnulig niðurgongd seinastu árini

Sæð undir einum hevur vinnulívið í Sandoyar Sýslu verið fyri einari niðurgongd tey seinastu árini. Roknskaparliga er gongdin merkt av, at fiskivinnan er tann størsta vinnan í sýsluni – til dømis vóru ¾ av bruttovinninginum hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu í 2005 at finna innan fiskivinnuna – og tá tað gongst illa í fiskivinnuni, so merkir hetta eisini heildartølini. Gongdin hjá fiskivinnuni í Sandoyar Sýslu hevur, sæð undir einum, seinastu árini verið merkt av versnandi úrslitum áðrenn skatt, við halli bæði í 2004 og í 2005. Rakstrarliga úrslitið ávirkar eisini skuldina og eginognina. Í tíðarskeiðinum frá 2002 til 2005 veksur skuldin, samstundis sum eginognin minkar, men hóast hetta, so er soliditeturin hjá vinnuni í Sandoyar Sýslu rímiliga góður. – Og soliditeturin hjá fiskivinnuni í Sandoyar Sýslu er í 2005 eisini betri enn soliditeturin hjá fiskivinnuni í Suðuroynni.

Roknskaparliga gongdin hjá handilsvinnuni og hjá ídnaðar- og handverksvinnuni er í stóran mun ávirkað av, at marknaðurin í Sandoynni er lítil og eru møguleikarnir tí avmarkaðir. Hetta er serliga galdandi fyri handilsvinnuna, sum hevur havt eina støðuga negativa gongd í árunum 2002 til 2005. Ídnaðar- og handverksvinnan hevur hinvegin havt eina betri gongd, við vaksandi bruttovinningi í tíðarskeiðinum – ein orsøkin er helst, at ídnaðar- og handverksvinnan kann bjóða seg fram á øðrum marknaðum, bæði í Føroyum og uttanlands.

Í vinnuligum høpi hevur gongdin undir einum verið skeiva vegin, og hóast árið 2005 roknskaparliga eydnaðist betri enn árið 2004, so hevði vinnan undir einum eitt hall áðrenn skatt. Í løtuni (februar 2007) ber illa til at siga nakað um hvussu gongdin hjá vinnulívinum í Sandoyar Sýslu hevur verið í 2006, tí roknskapir eru vanliga ikki tøkir fyrr enn árið er hálvrunnið ella seinni.

# 6. Vakstrarmøguleikar og Sandoyar Sýsla[7]

Tá lýsingar verða gjørdar av ymiskum økjum í landinum, sum meiri ella minni eru avskorin frá meginøkinum, er tað áhugavert at knýta saman fólkatalslýsingar og lýsingar av vinnulívinum. Ikki minst tá hugsað verður um, at tað lokala vinnulívið – saman við teimum almennu arbeiðsplássunum – skal virka sum grundarlag hjá tí lokalu arbeiðsstyrkini og sostatt eisini sum grundarlag fyri, at fólk skal hava áhuga í at búseta seg í økinum.

Omanfyri er víst, hvussu gongdin í vinnulívinum í Sandoyar Sýslu hevur verið merkt av niðurgongd í árunum 2002 til 2005. Hendan niðurgongd er eisini sjónlig, tá tað snýr seg um talið av løntakarum, sum arbeiða í vinnuni í Sandoyar Sýslu. Vinnuligu bakkøstini í fyrru helvt av 1990árunum førdu við sær stóra minking í talinum av løntakarum. – Og í tíðarskeiðinum frá 1990 fram til 2005 er talið av løntakarum innan fiskiskap og fiskivinnu á landi minkað við umleið 35% (Hagstova Føroya). Orsøkin til minkingina innan fiskiskap er m.a., at talið av skipum er minkað. Minkingin í talinum av løntakarum innan fiskivinnuna á landi kemst helst av millum øðrum øktari kapping um arbeiðsfólkið, og vísa kanningar, at fleiri frávelja at arbeiða í fiskivinnuni á landi (Holm og Mortensen, 2006). Sandoy Seafood hevur eisini í fleiri umførum seinasta hálva árið víst á, at tey mangla fólk.

Umframt privata vinnulívið er tann almenni sektorurin eisini ein týðandi arbeiðsgevari í Sandoyar Sýslu. Útbyggingin innan eldraøkið og barnaansing, fyri at nevna tvey dømi, hevur verið lutfalsliga stór í Sandoynni tey seinastu 10 árini. Hetta hevur eisini skapt fleiri arbeiðspláss, soleiðis at almenni sektorurin í 2005 var størsti einstaki arbeiðsgevarin í Sandoyar Sýslu. Í 1990 arbeiddu umleið 18% av løntakarunum í Sandoyar Sýslu innan almenna fyrisiting o.a. (herundir er eisini skúlaverkið, heilsu- og almannaverkið o.s.fr.). Í 2005 var hetta talið vaksið til umleið 25% (Hagstova Føroya).

[7] Hóast yvirskriftin vísir til Sandoyar Sýslu, tvs. eisini Skúvoy og Stóra Dímun, so verður ikki komið inn á vakstrarmøguleikarnir hjá Skúvoy og Stóra Dímun í hesum partinum. Avbjóðingarnar í Skúvoy og í Stóra Dímun – eins og í hinum útoyggjunum – verða viðgjørdar í einari sjálvstøðugari verkætlan (og útgávu) í 2007/2008.

Hetta mynstrið sæst eisini aftur í lønarútgjaldingunum. Í tíðarskeiðinum frá 1990 til 2005 eru lønarútgjaldingarnar innan framleiðsluvinnur – sum í Sandoyar Sýslu primert fevna um fiskiskap og fiskivinnu á landi[8] – minkaðar við 11%. Úr 60,5 mill. kr. í 1990 til 53,7 mill. kr. í 2005, hetta hóast ein munandi lønarhækking hevur verið í tíðarskeiðinum. Í sama tíðarskeiði eru lønarútgjaldingarnar innan almenna sektorin nærum tvífaldaðar, frá 22,4 mill. kr. í 1990 til 43,4 mill. kr. í 2005. Í 2005 umboðaðu almennu lønirnar 32% av samlaðu lønarútgjaldingunum í Sandoyar Sýslu, í 1990 var talið 18% (Hagstova Føroya).

Almenni sektorurin er tey seinastu árini vaksin skjótt, og er helst eisini tann sektorurin,sum er vaksin skjótast í Føroyum seinastu 10 árini[9]. Hetta hevur eisini verið galdandi í Sandoyar Sýslu – og bara í tíðarskeiðinum frá 2000 til 2005 eru lønargjaldingarnar innan almenna sektorin í Sandoyar Sýslu vaksnar við meiri enn 55% (Hagstova Føroya).

Nógv bendir á, at vøksturin í almenna sektorinum í Sandoyar Sýslu hevur havt stóra ávirkan á gongdina í fólkatalinum, skilt soleiðis, at uttan vøksturin innan almenna sektorin, so er tað sannlíkt, at fólkatalið í Sandoyar Sýslu var minkað enn meiri tey seinastu árini. Vøksturin innan almenna sektorin hevur uttan iva eisini drigið fleiri fólk til Sandoynna, einamest tí at ein partur av hesum størvum krevja útbúgvin fólk. Við øðrum orðum hevur vøksturin innan almenna sektorin í Sandoyar Sýslu lutvíst uppvigað vinnuligu niðurgongdini, og á tann hátt hevur almenni sektorurin havt ein stabiliserandi ávirkan á gongdina í fólkatalinum.

Um hugt verður at arbeiðsloysistølunum, so er eisini greitt, at lutfalsliga fleiri fólk eru í arbeiði í Sandoyar Sýslu nú enn í undanfarnum árum. Talið av arbeiðsleysum í landinum sum heild er (við árslok í 2006) sera lágt. Hetta er eisini støðan í Sandoyar Sýslu. Í desember vóru umleið 1,1 % av arbeiðsstyrkini (16-66 ár) í Sandoyar Sýslu arbeiðsleys. Sama talið var fyri Føroyar 2,1%. (Hagstova Føroya).

---

[8] Tó eru aðrir bólkar eisini umboðaðir í framleiðsluvinnuni, t.d. landbúnaðurin, alivinnan, smiðjuvirksemi, og annar ídnaður, men hesir fylla heilt lítið í mun til fiskiskapin og fiskivinnuna á landi.

[9] Um lønarútgjaldingarnar vera brúktar sum mát, so eru lønarútgjaldingarnar innan almenna sektorin øktar við 185,8% í árunum 1985-2005. Í sama tíðarskeiði eru lønarútgjaldingarnar innan framleiðsluvinnurnar vaksnar við 48,7% og innan Bygging, Handil, Flutning vm. við 102,1% (Hagstova Føroya).

Hóast økt virksemi – eisini innan almenna sektorin – so eru miðallønirnar í Sandoyar Sýslu nakað lægri enn miðallønirnar í landinum sum heild. Í 2005 vórðu tilsamans 137.302 milliónir goldnar út í lønum til fólk búsitandi í Sandoyar Sýslu. Í miðal var hetta umleið 153.500 kr. pr. fólk í arbeiðsførum aldri (16-66 ár). Sama tal var fyri landið sum heild umleið 196.000 kr. Við øðrum orðum var miðalinntjeningin hjá arbeiðsstyrkini í Sandoyar Sýslu umleið 11,5% lægri enn í landinum sum heild (Hagstova Føroya).

## 6.1. Undirsjóvartunnil og ávirkan á Sandoynna

Avmarkaða fólkatalið í Sandoyar Sýslu merkir helst, at vakstrarmøguleikarnir innan almenna sektorin eru avmarkaðir, hetta ikki minst tá hugsað verður um, at eldraøkið og barnaansingarøkið eru væl útbygd í Sandoynni. Við hesum og gongdini í vinnulívinum í huga, so skulu rímiliga stórar broytingar til í Sandoynni, um gongdin í fólkatalinum skal broytast munandi til tað betra.

Seinastu árini er kjakið um undirsjóvartunnil millum Streymoynna og Sandoynna vorðið ein natúrligur partur av kjakinum um útbygging av infrakervinum í Føroyum. Nógv bendir á, at verklagslóg um undirsjóvartunnil til Sandoynna verður samtykt í Løgtinginum áðrenn komandi Løgtingsval (sum verður í seinasta lagi í januar 2008). Sostatt verður tað í hesum árinum greitt, um og nær undirsjóvartunnilin til Sandoynna verður liðugur[10].

Ongin ivi er í, at fast samband við meginøkið fer at broyta umstøðurnar hjá fólki og vinnuni í Sandoynni heilt grundleggjandi. Fjarstøðan í tíð úr Skopun til Havnar verður tá styttri enn fjarstøðan úr Kollafirði (sum er ein partur av Tórshavnar kommunu) til Havnar – tað sama er galdandi fyri tær flestu av hinum bygdunum í Sandoynni.

[10] Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, svaraði í februar 2007 í Løgtinginum einum fyrispurningi viðv. Sandoyartunlinum, har hann vísti á, at verklagslóg verður løgd fyri Løgtingið í Ólavsøkutingsetuni í ár (2007). - At arbeiðið væntandi kann bjóðast út fyrra hálvár 2008. – Og at tunnilin væntandi verður liðugur í 2014 (www.bkv.fo).

**Verandi farleið og fast samband**
Í dag tekur tað 30 minuttir at sigla um Skopunarfjørð við Teistanum. Fyrsta fráferð er kl. 6.45, tann næsta kl. 8.10. Tey flestu sum skulu náa eina fráferð fyri at verða til arbeiðis í miðstaðarøkinum antin kl. 8.00 ella 9.00, brúka uttan iva 10-15 minuttir í bíðitíð í Skopun, áðrenn tey sleppa umborð og loyst verður frá landi. Við øðrum orðum fara uml. 40-45 minuttir, hvørja ferð siglast skal um Skopunarfjørð (longur, um Teistin eisini skal leggja at í Hesti).

Við føstum sambandi verða tað umleið 25 km. til Havnar (13. km á Gomlurætt og undirsjóvartunnilin verður væntandi 12 km.) og tekur tað tá umleið 20 minuttir at koyra úr Skopun til Havnar, um tú koyrir 80 km/t.

Við øðrum orðum, um tú skal møta til arbeiðis kl. 8.00, nýtist tær ikki at fara úr Skopun fyrr enn kl. 7.30 – og sparir tú sostatt 45-60 minuttir. Skalt tú møta kl. 9.00, so kanst tú fara úr Skopun kl. 8.30, og sparir tú sostatt 20-35 minuttir í mun til verandi ferðaætlan hjá Teistanum.

Ikki minst, so slepst undan at hugsa um, hvussu veðrið er at sigla, um veðurlíkindini fara at føra við sær avlýsingar av fráferðum o.s.fr. Tískil kanst tú eisini fara, tá tú hevur hug – og ikki sum nú eftir ferðaætlanini hjá Teistanum.

Við øðrum orðum gerst Sandoyggin við einum undirsjóvartunli ein veruligur partur av miðstaðarøkinum, har fólk hava fulla atgongd[11] til arbeiðsmarknað, handils- og tænastuvinnuna og ikki minst til undirhalds- og frítíðarlívið í miðstaðarøkinum. Fyri vinnuna verður eisini talan um grundleggjandi broytingar, tí við føstum sambandi verður skjótari og lættari at flyta vørur og tænastur, bæði norður og suður um Skopunarfjørð.

Ein tílík broyting fer at føra við sær heilt aðrar vakstrarmøguleikar í Sandoynni enn higartil. Størsta broytingin verður, at tað verður ikki tað lokala vinnulívið og tey lokalu almennu arbeiðsplássini, sum skulu skapa framburð, tí fast samband gevur jú møguleika fyri at fáa fullan lut í framburðinum, sum er í miðstaðarøkinum. Gongdin í bæði Norðstreymoy, Eysturoy og Vágum vísa greitt, at alsamt fleiri fólk fjarferðast (pendla) til arbeiðis í Tórshavn (sí eisini Holm, 2004). Hendan gongdin vil eisini koma at fevna um Sandoynna, har tað verður ein heilt natúrligur partur av gerandisdegnum at koyra til arbeiðis í miðstaðarøkinum.

---

[11] Farleiðin um skopunarfjørð er í dag framhaldandi ein avmarking, hóast nýtt skip og økt túratal – so talan er ikki um fulla atgongd, fullan flexibilitet.

Vakstrarmøguleikarnir vilja við undirsjóvartunlinum serliga verða við Sandoynni sum bústaðarøkið – har fólk búgva, men í stóran mun arbeiða aðrastaðni (og sjálvsagt eisini í Sandoynni). Hendan broyting vil eisini føra við sær vøkstur í fólkatalinum, eins og tað hevur verið galdandi fyri aðrar bygdir nærhendis Tórshavn. Avbjóðingin í Sandoynni verður tá einamest at arbeiða við at skapa best møguligar karmar á trivnaðarøkinum, fevnandi um øll tey viðurskifti, sum hava týdning, tá fólk skulu gera av, hvar tey seta búgv. Í hesum sambandi hava bústaðarmøguleikar (kommunalar útstykkingar) og bústaðarkostnaðurin sjálvsagt týdning. Hartil hava kommunal tænastutilboð sum barnaansing, fólkaskúla og ítróttar- og frítíðarítriv eisini týdning, umframt at eitt barnavinarligt umhvørvi og náttúran hava týdning[12].

Eisini í vinnuligum høpi skapar fast samband aðrar vakstrarmøguleikar. Eitt er, at lokala vinnulívið lættari kann kappast á fleiri marknaðum, men somuleiðis er tað hugsandi, at tað verður áhugavert hjá nýggjum fyritøkum at búfestast í Sandoynni. Vinnuøki í Havnini eru dýr, um samanborið verður við kostnaðin í t.d. Sandoynni. Og tá fjarstøðan úr Sandoynni til Havnar bert er 20-30 minuttir, so er Sandoynni uttan iva áhugaverd sum vinnuøki.

Fast samband við meginøkið vil ávirka gongdina í fólkatalinum og sostatt eisini fólkatalssamansetingina. Fleiri ungar familjur fara at flyta til økið – hetta er ein gongd, sum hevur verið serliga sjónlig í Vágum í smb. Við, at fast samband kom vestur í Vágar[13]. Tí verða eisini fleiri børn í økinum, og í mun til í dag vilja tað eisini verða lutfalsliga fleiri ung fólk. Í mun til støðuna í dag, har fráflyting og manglandi valmøguleikar av arbeiðstilboðum eru trupulleikar, sum økið stríðist við, vil støðan eftir undirsjóvartunnilin verða munandi øðrvísi. Trýstið verður tá á kommunurnar í økinum um at bjóða fram bústaðarøkið, tilboð innan barnaansing og skúla o.s.fr. Umframt at vinnan bæði fær betri møguleikar, samstundis sum vinnan fær størri kapping.

[12] Hetta eru viðurskifti sum fólk í øðrum bygdum kring miðstaðarøkið vísa á at hava týdning í teirra persónligu raðfesting (Holm, 2004).
[13] Samrøður við kommunuskrivstovurnar í Miðvági, Sandavági og Sørvági.

# 7. At enda

Í tí modernaða samfelagnum er mobilitetur eitt lyklahugtak, bæði hjá vinnulívinum og hjá einstaklingum. Tað at kunna flyta seg skjótt og lætt úr einum stað í annað, at kunna flyta seg eftir nýggjum møguleikum og tilboðum, er ein týðandi partur av bæði modernaða vinnulívinum og av modernaðu familjuni. Hetta er eisini ein týðandi partur av menningini av einum samfelagi sum heild. Til dømis gevur full atgongd til vakstrarøkir møguleika fyri lut í øktari menning, meðan tey økini, har fólk og vinna ikki hava møguleika hesum – ikki hava fulla atgongd til vakstrarøki – í nógvum førum ikki megna at skapa nakran munandi vøkstur.

Hetta er eisini støðan í Føroyum í dag. Til dømis hevur gott vegasamband við Havnina/miðstaðarøkið havt týðandi leiklut fyri vøksturin í Sundalagnum og í Eysturoynni. Undirsjóvartunnil vestur í Vágar hevur eisini havt stóran týdning fyri gongdina í Vágum tey seinastu árini. Og fara vit komandi árini helst eisini at síggja broytingar í Klaksvík og øðrum pørtum av Norðoyggjum, nú koyrandi er undir Leirvíksfjørð. Manglandi atgongd til vakstrarøkini hava hinvegin ført við sær minni vøkstur og í summum førum eisini stagnasjón í pørtum av landinum, hetta hevur t.d. verið galdandi fyri útoyggjar, Suðuroy og eisini Sandoy.

Ein framhaldandi útbygging av infrakervinum vil tó broyta fyritreytirnar hjá fólki eins og hjá vinnuni í alsamt fleiri pørtum av landinum. Ein undirsjóvartunnil til Sandoynna fer eisini grundleggjandi at broyta fyritreytirnar í Sandoynni. Stutt sagt vil støðan í Sandoynni eftir heilt stuttari tíð broytast frá at vera útoyggja-kend til, at Sandoyggin er mitt í meginøkinum, 15-20 minuttir frá Havnini.

Hetta arbeiðsritið gevur eina mynd av, hvussu gongdin í Sandoyar Sýslu hevur verið tey seinastu árini, bæði hvat viðvíkur fólkatali og hvat viðvíkur vinnulívinum í økinum. Lýsingarnar í ritinum geva ábending um, at vakstrarmøguleikarnir í Sandoyar Sýslu í verandi støðu ikki eru stórir – og at tað skulu stórar broytingar til, um støðan í økinum skal broytast munandi. Ætlanirnar um undirsjóvartunnil millum Streymoy og Sandoy er greitt ein broyting, sum fer at ávirka gongdina í Sandoynni rætta vegin.

At enda kann leggjast afturat, at hetta arbeiðsritið eisini er áhugavert á tann hátt, at talan er um eina lýsing av fólki og vinnu í Sandoyar Sýslu, áðrenn avgerð er tikin um at fara undir undirsjóvartunnil millum Streymoy og Sandoy. Um (ella tá) farið verður undir Sandoyartunnilin, so er við hesum ritinum eisini grundarlag fyri at gera eina lýsing av, hvussu gongdin broytist meðan arbeiðið er í gongd, og ikki minst, hvussu Sandoyggin er broytt eitt ávíst áramál eftir, at koyrandi er undir Skopunarfjørð.

# Bókmentur og keldur


Aposle, Richard, Dennis Holm, Gestur Hovgaard, Ólavur Waag Høgnesen, og Bjarni Mortensen, 2002. *The Restructuration of the Faroese Economy – The Significance of the Inner Periphery*. København: Samfundslittertur 2002.

Holm, Dennis, 2004. *Fjarferðing í Føroyum*. Arbeiðsrit 8/2004. Granskingardepilin fyri Økismenning 2004.

Holm, Dennis, og Bogi Mortensen, 2006. *Arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini*. Arbeiðsrit 11/2006. Granskingardepilin fyri Økismenning 2006.

BKV, Bókhalds- og roknskaparstova í Sandoynni: www.bkv.fo

Business-Line: www.business-line.fo

Dimmalætting, 23. mai 2006

Hagstova Føroya: www.hagstova.fo

Sosialurin 6. mars 2001.

Yrkisdepilin: www.yrkisdepilin.fo